## Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið

# 2 løgfrøðingar

Søkt verður eftir tveimum løgfrøðingum til lógardeildina í Stýrinum at byrja 1. apríl 2000 ella so skjótt til ber.

**Høvuðsuppgávur hjá løgfrøðingunum verða:**

- Málsviðgerð innan meirvirðisgjald, skatt, toll og onnur avgjaldsumráði
- innheintingarmál
- at ráðgeva Toll- og skattstovuni kring landið í løgfrøðiligum spurningum innan umsitingarumráði stovnsins
- at leggja til rættis kunngerðir, rundskriv og vegleiðandi ásetingar á skatta- og avgjaldsøkinum
- at gera ummælir í kærumálum og
- at luttaka í lógarfyrireikandi arbeiði.

**Førleiki:** Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum cand. jur. ella líknandi útbúgving og kunna arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum.

Stýrið tekur sær av yvirordnaðari planlegging, stýrings-, eftirlits- og menningaruppgávum, av sambandinum við Toll- og Skattaráðið, aðalstýrið og landstýrið, og virkar sum ráðgevi hjá økjunum í løgfrøðiligum og øðrum fakligum spurningum um toll, skatt, meirvirðisgjald, onnur avgjøld og innheinting.

Á lógardeildini eru 7 størv.

**Vit bjóða:**

- spennandi starv við avbjóðingum, fakliga eins væl og persónliga
- flex tíð
- sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir:** Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya. Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, sum settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

**Nærri frágreiðing um starvið:** Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Anju Hovgaard, tlf. 35 20 26.

**Umsóknir:** Umsóknir við avviti av prógvi og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin 14. mars 2000.

**Toll- og Skattstova Føroya**
Stýrið
Postboks 2151
FO-165 Argir

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur hjá landinum hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg- og inntøkuskattalóggávuna. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum, sum heldur til á Argjum. Tær seks økisskrivstovunar, sum eru í Klaksvík, Saltangará, Sørvági, Skopun, á Tvøroyri og í Tórshavn, røkja raksturin.

# Ársaðalfundur

## Sands Arbeiðarafelag

**Stovnað 11. jan. 1961**

lýsir til aðalfund í Ungmannafelagshúsinum á Sandi, mikukvøldið 08. mars 2000 kl. 20.00 við hesi dagsskrá:

1. Frásøgn frá farna ári
2. Grannskoðaður roknskapur til góðkenningar
3. Ásetan av limagjaldi
4. Val av nevnd og tiltaks
5. Mál, ið nevndin ella limir vilja hava til viðg. á aðalfundinum.

**Um fundurin ikki verður viðtøkuførur - verður eykaaðalfundur hildin hálvan tíma seinni.**

Limir felagsins hava rætt til at bera fram uppskot til viðgerðar á aðalfundinum. Hesi uppskot skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 8 dagar frammanundan aðalfundinum.

**Møtið fjølment!!!**

**Nevndin**

# Skrivstovustarv

Eitt starv sum avloysari fyri skrivstovufólk á Landsmiðstøðini, sum er í farloyvi til umleið november 2000, er leyst at seta skjótast tilber.

**Arbeiðið fevnir um**

- avgreiðslu av viðskiftafólki
- útlán av undirvísingaramboðum
- røkt av Kunningarsavninum
- bókhald - ávísingar, rokningar v.m.
- ymiskt annað arbeiði á stovninum

**Vit vænta at tú hevur**

- royndir í skrivstovuyrkinum
- kunnleika á brúkarastøði til teld, t.d. at brúka Word og onnur Microsoft-forrit
- royndir og dugir at arbeiða sjálvstøðugt, ert røkin, hevur góð samstarvsevni og hevur lætt við at samskifta við fólk

**Vit kunnu bjóða**

- Eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv í einum stovni, sum hevur regluligt samskifti við flestu skúlar og lærarar í landinum, og sum hevur tætt samstarv við fyrisitingina í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.

Talan er um 3/4 starv. Men væntast kann, at arbeitt verður fulla tíð til juli mánaða. Starvið verður lønt sambært sáttmálanum ímillum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið í 9. lønarflokki.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Petur Simonsen, leiðara á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir v.m. skulu sendast Landsmiðstøðini í seinasta lagi mánadagin 6. mars 2000.

**Landsmiðstøðin fyri Undirvísingaramboð**
Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3084
FO-110 Tórshavn

Landsmiðstøðin er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingaramboð, hevur saman við UMMS eina lærugreinráðgevaskipan, skipar fyri fak- og inspiratiónsskeiðum fyri lærarum og hevur verkstaðarmøguleikar. Á Landsmiðstøðini starvast, umframt leiðaran, 3 skrivstovufólk og 8 lærugreinaráðgevar - tilsamans umleið 6 1/2 fulltíðarstarv.

# ESAB LHF

630 tyristorreguleráð sveisimaskina til sølu fyri kr. 20.000,00 v/MVG vegna keyp av minni maskinu. Sær gott út og riggar væl.

Nýprísur 47.1000,00 v/MVG.

**ESAB-umboðið**
v/Poul Poulsen
Tlf. 318214 og 284678

# Urtagarðsarbeiði

Vit átaka okkum allar uppgávur viðvíkjandi nýgerð av urtagørðum herundir leggjan av flísum og smærri grótlaðingar.

Somuleiðis átaka vit okkum røkt av urtagørðum og kunnu samstundis minna á, at nú er rætta árstíðin at flyta/klippa trø og runnar.

**Fa. Urtagarðsrøkt v/Mass Jensen**
Nólsoy Tlf. 32 71 31 – 28 39 53

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 2326, **P/F Atlantic Plast, 950 Porkeri.**

**Vi›tøkur broyttar:** 13.02.2000.
**N‡ggj hjánøvn:** P/F Atlantic Bygging (P/F Atlantic Plast), P/F Atlantic Building Contractors (P/F Atlantic Plast), P/F Faroe Plast (P/F Atlantic Plast) og P/F North Atlantic Plast (P/F Atlantic Plast).
**N‡ggjur heimsta›ur:** Tórshavnar Kommuna
**Nevnd:** innkomin í nevndina: Maria Lava, Fjalsgøta 35, 100 Tórshavn (forma›ur), Olaf Lava, Fjalsgøta 35, 100 Tórshavn og Páll Magnar Kjærbæk, Fjalsgøta 35, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Innkomin sum stjóri: Olav Lava, Fjalsgøta 35, 100 Tórshavn.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka byggivirksemi og ídna›arvirki herundir at gera framlei›slur úr plast og selja framlei›sluna.

Skráseting Føroya tann 16. februar 2000

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 2535, **P/F Vestfelli, 410 Kollafjør›ur.**

**Vi›tøkur broyttar:** 29.11.1999.
**Kapitalur:** Hækking vi› kr. 1.000.000,00 til kr. 2.000.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 1.000.000,00 til kurs 100.

Skráseting Føroya tann 16. februar 2000

Kristin Balle



# Skrivstovustarv

Vegna eitt av viðskiftafólkum okkara, eitt fakfelag við skrivstovu í Tórshavn, verður søkt eftir skrivstovufólki at byrja 01.03.2000.

**Arbeiði:**

- at taka sær av brævskifti
- taka telefon
- annað fyrifallandi arbeiði á skrivstovuni

**Førleikakrøv:**

- skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving
- køn/kønur í rættskriving, serliga í føroyskum, men eisini í norðurlendskum og enskum máli
- hollar royndir innan EDV/tekstviðgerð
- royndir frá skrivstovuarbeiði

**Setanartreytir:**

- sambært avvarðandi sáttmála

**Umsóknarfreist:**

- hin 25.02.2000
- við umsóknini skulu sendast avrit av próvskjølum og møguligum viðmælum

Áhugaði kunnu við at venda sær til Páll Nielsen fáa nærri upplýsingar um nevnda starv.

**Advokatvirkið**
Páll Nielsen, adv. • Sigmund Poulsen, adv.
J. H. Schrøtersgøta 20 • Postsmoga 85
FO-110 Tórshavn
Tlf. 312171 • telefax 318574
E-mail: advokat@post.olivant.fo

P/F Meinhardt Arge

Sóknast verður eftir

# leiðara

## til mekaniska verkstaðin

at mynda virkið og samskifta við viðskiftafólk.

**Vit vænta:**

- Ein við viðkomandi útbúgving
- Ein ið hevur teldukunnleika
- Helst við leiðsluroyndum
- Góð samstarvsevni
- Góð evni at leggja arbeiði tilrættis

**Vit bjóða:**

- Løn eftir avtalu og førleika
- Gott arbeiðsumhvørvi

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum skal sendast til

**P/F Meinhardt Arge**
Att: Tummas Nielsen
Box 3171, 110 Tórshavn
Tel 31 61 61, fax 31 61 60

P/F Meinhardt Arge umboðar bilmerkini Opel, Nissan og Peugeot, P/F Meinhardt Arge hevur plátu- og lakk verkstað, Nissan og Peugeot bilasølu og fyrisiting á Hálsi. Goymslu, mekaniskan verkstað og Opel bilasølu við Oyggjarvegin. Hjá P/F Meinhardt Arge starvast 37 fólk.

team 85 · 31 65 11

# 32 tons útróðrarbátur

sum hevur snelluloyvið í Íslandi og fiskidagar í bólki 4a, til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 214949 ella 288473**

J|Ä|S|P|I **KETLAR**

*Teir vælumtóktu ketlarnir eru á goymslu*



**Bæði dupultir og einkultir**

Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð. Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.

**- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum**

**MARIA POULSEN & CO**
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000



**Skorsteins-sóparin**

**er við til at halda umhvørvið reint**

**Jimex Brenniovnar**
**Isokern Skorsteinsbjálving**
**Isokern Skorsteinselementir**
**Lúkur - Fuglaristir**
**Ventilar - Roykhattar**

**Andrass á Krossbrekku**
Skúlagerði - 430 Hvalvík
tel +298 422456
far+ 298 286458
fax + 298 422458
andrass@post.olivant.fo
heima.olivant.fo/-andrass

# AMBOÐ

*Gevind amboð - AC amboð - Tente hjól - Ketusagir - alt til drejibenkur - Trýstspularar - Sveisitól - Luftkompressarar - Taljur - Stroppar - Skjótiseym - Sláimaskinur - Støvsúgvarar - Stigar - Flakaknívar - El-aggregat - Laditól - El- og hondamboð - Luftslangur - Spulislangur - útleiguamboð - Umvæling.*

Keyp har tú fært mest fyri pengarnar.
Góð servica.
*Keyp frá fakmanninum ...*

**Tórshavnar Maskinhandil**
*v/ Tummas Andreasen*
Varðagøta 29-30 - Tlf. 313442

**Søkt verður eftir bilmekanikara**

**Møguleiki verður at fáa útbúgving hjá BMW og FIAT í Danmark.**

**Bilfríðkan**
*Velbastaðvegur • 110-Tórshavn*
*Tel. 31 73 00 - 21 73 00*
FIAT

Sosialurin - 311820

# Til sølu

**Fiat Punto árg. 1997**

**Fiat Cinquecento árg. 1995**

Bilarnir eru sum nýggir. Sera lagalig fígging.

**Bilfríðkan**
*Velbastaðvegur • 110-Tórshavn*
*Tel. 31 73 00 - 21 73 00*
FIAT

Sosialurin - 311820

**Frá Javnaðarflokkinum**

# Eyka landsfundur 2000

verður á Læraraskúlanum leygardagin kl. 10. Skrá: Ríkisrættarliga støðan.

| | |
|---|---|
| Kl. 10.00 | Fundarskipan |
| Kl. 10.15 | Formaðurin leggur upp til kjak |
| Kl. 10.45 | Orðaskifti |
| Kl. 12.00 | Matsteðgur |
| Kl. 12.45 | Orðaskifti heldur fram |
| Kl. 16.00 | Fundarsamtykt. |

**Javnaðarflokkurin**

# SVIMJING FYRI ELDRI OG PENSJÓNISTAR

er hvønn leygarmorgun frá kl. 09.00 til kl. 10.00

Verið hjartaliga vælkomin

SVIMJI HØLLIN

**SVIMJIHØLLIN Í KLAKSVÍK**

Sosialurin - 311820

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

Sosialurin - 311820